
LANDSPÍTALI
HÁSKÓLASJÚKRAHÚS

LYFLÆKNINGASVIÐ

Myndatøka av krúnulívæðr
(hjartatræðing)

Myndatøka av krúnulívæðr er ein røntgenkanning, ið er gjørd til at meta um støðuna hjá æðrini. Kanningin verður gjørd á hjartatræðingarstovuni og tekur umleið 1 tíma.



Fyrireiking til kanning

Tú verður biðin um at møta á Hjartagátt 10 D, sum húsast í kjallaranum á Landspitalið við Hringbraut. Tekur tú heilivág regluliga, ert tú biðin um at taka hann við.

Viðtala við sjúkrarøktarfrøðing

Á Hjartagátt fært tú kunning og vegleiðing frá sjúkrarøktarfrøðingi, um hvussu tú skalt fyrireika teg til kanningina og hvat tú kann vænta tær í samband við hana. Sjúkrarøktarfrøðingurin, fær upplýsingar um hvussu heilsustøðan hjá tær hevur verið og journalførir tær. Innskrivingin tekur umleið 2-4 tímar.

Kanning

Blóðroynd og hjartarit verða tikin.

Heiliváigur og ovurviðkvæmi

Um tú ikki tolir ávísan heiliváig, ella um tú hevur ovurviðkvæmi orsakað av matvørum, prýðislutum ella ymisk evni, skalt tú endiliga siga frá tí.

Vinarliga hav í huga, at sjúkrahúsið ikki tekur ábyrgd av peningi ella øðrum virðislutum, so sum fartelefonum, teldum o.ø., sum sjúklingurin ella avvarðandi hava við sær. Gevið gætur, at starvsfólk og næmingar á sjúkrahúsinum eru bundin av tagnarskyldu og mugu tí ikki tosa við teg ella onnur um viðurskifti hjá sjúklingum á deildini. Tí biðja vit teg og avvarðandi tíni um ikki at tosa um tað, sum tit kunnu vera vitni til ella hoyra um aðrar sjúklingar á deildini. Landspitalið er frálærusjúkrahús, og næmingar í sjúkrarøkt fáa ein part av læru sínu á Landspitalinum. Næmingar fylgja við og taka lut í dagligu viðgerðini av sjúklingum og eru altíð undir ábyrgd og vegleiðing av leiðbeinara sínum.

Føsta

Umráðandi er at magasekkurin er tómur undan kanningini.

- **Ikki eta 6 tímar undan kanningini.** Mælt verður til, at bert eta lætta føði, áðrenn tú leggur teg kveldið fyri kanningina fyri at minka árin av at fasta.
- **Klárir drykkir kunnu drekkast í smáum í upp til 2 tímar undan kanningini.** Klárir drykkir eru luktleysir drykkir við ongari fiti ongari mjólk í, eitt nú vatn, klár fruktsaft, (við ongum frukttrægrum) te og kaffi. Umráðandi er ikki at roykja ella tyggja tyggigummi seinastu 2 tímarnar undan kanningini.
- Tablettir, skulu svølgjast við bert einum munni av vatni.

Tú skalt fara í brúsu um morgunin dagin, sum kanningin fer fram. Naglalakk og andlitssmyrsl skal takast av. Best er, at lata skart og annað virðismikið stás verða eftir við hús.

Vit mæla til tá ið tú verður útskrivað/ -ur, skal **búgvi fólk fylgja tær**, og verða hjá tær heima. Tú mást ikki koyra bil ella annað akfar sjálv/-ur. Hetta er galdandi alt tað fyrsta samdøgrið eftir kanningina.

Innleggingardagin, verður tú biðin um, at hava við lutir og tilfar til persónligt reinføri, inniskógvar og morgunkápu. Til ber at nýta fartelefon. Hon skal tó vera ljóðleys og ikki til ampa fyri onnur.


Kanningardagin

Við komu á deildina, verður tú móttikin og vísa til rættis. Síðani verður tú fyrireikað/-ur til kanningina. Ein sonevndur leggur, (katetur) verður lagdur høgrumegin i lærkreppingini, (lyskuni) ella í skøvningin. Undir kanningini verður sissandi heilivágur givin. Ein klænur leggur verður træddur ígjøgnum pulsæðrina frá lærkreppingini ella skøvninginum upp til byrjanina á krúnulívæðrini. Litevnið verður sprænt gjøgnum leggin, sum síðan verður røntgenmyndað. Eftir myndatøkuna verður trýst lagt omaná sárið.

Aftan á kanningina

- Tú kanst drekka okkurt, ein tíma aftaná
- Um stungið hevur verið í pulsæðr í lærkreppingini, verður tú liggjandi í seingini umleið 4-6 tímar aftaná.
- Um stungið hevur verið í pulsæðr í skøvninginum, verður tú liggjandi í seingini. Læknin tekur støðu til nær tú kann fara upp at ganga.
- Umráðandi er, at liggja púra still/-ur á rygginum, og ikki at lyfta høvdinum upp frá. Hetta verður gjørt til, at forða fyri bløðing úr stungustaðnum.
- Tú verður útskrivað/-ur sama dag, sum kanningin fer fram.

Krúnulívæðravíðkan



Viðhvørt verður krúnulívæðravíðkanin gjørd beinleiðis aftan á myndatøkuna. Ein katetur verður lagdur inn í hövuðslívæðrina (aorta) har sum tipping/ treinging er í krúnulívæðrini til hjartað. Síðan verður ein klænur metaltráður drigin ígjøgnum krúnulívæðrina, har sum æðrin er trong. Metaltráðurin, verður síðan drigin ígjøgnum eina ballón, sum síðan verður fylt við vætu. Hetta verður gjørt fyri at víðkað æðrina.(sí mynd) Sum oftast verður eitt stuðulsnet (stent) sett inn í æðrina til at forða fyri, at trupulleikarnir taka seg upp aftur. Ein proppur av bindivevnaði verður settur omaní stungustaðið í lærkreppingini. Hesin proppurin av bindivevnaði hvørvur aftan á 6-8 vikur. Bind verður lagt omaná stungustaðið í skøvninginum fyri at minka um trýstið.

Aftan á krúnulívæðravíðkanina

- Elektrodur verða settar á bringuna til yvirvaking av hjartanum
- Við komu á deildina kanst tú drekka okkurt. Aftan á ein tíma kanst tú byrja at fáa tær at eta
- Blóðtrýst og pulsur verða regluliga mátað
- Um stungið hevur verið í pulsæðr í lærkreppingini, verður tú liggjandi í seingini í 4-6 tímar aftaná. Umráðandi er at tú liggur púra still/-ur á rygginum og ikki at lyfta høvdinum upp frá. Hetta verður gjørt fyri, at forða fyri bløðing úr stungustaðnum. Aftan á teir 4-6 tímarnar, er í lagi, at fara upp at standa og at ganga inni á deildini.
- Um stungið hevur verið í pulsæðr í skøvninginum, verður tú liggjandi í seingini. Læknin tekur støðu til nær tú kann fara upp at ganga.
- Í serligum førum verður givin blóðtynnandi heilivágur. Ein plastnál verður løgd inn í eina æðr, har blóðtynnandi heilivágurin verður latin í til dagin eftir kanningina.
- Tú verður útskrivað/-ur dagin eftir kanningina.

Áðrenn útskrivaðan fært tú:

- Kunning og vegleiðing viðvíkjandi heimferð
- Leiðbeiningar um tín heilivág
- Viðtala við fysioterapeut
- Kunning um eftirkanningi

Útskriving

Stungustaðið

Umráðandi er at tú heldur eyga við stungustaðnum, teir fyrstu dagarnar aftaná. Plástur verður lagt omaná stungustaðið, ansa væl eftir at plástrið verður ikki vátt. Tað er í lagi at fara í brúsu dagin eftir kanningina, men mælt verður frá at fara í baðikar ella svimja teir fyrstu 3-4 dagarnar aftan á kanningina . Tað er einki óvanligt at tú kanst fáa pínu í stungustaðið og at tað verður eymt í 1-2 dagar aftaná.

Rørsla

Teir fyrstu dagarnar eftir kanningina skalt tú taka tær av løttum og ikki leggja ov nógv fyri. Mælt verður frá at lyfta tungar lutir.

Aftur til arbeiðis

Vanligt er, at ein verður sjúkrafráboðaður í nakrar dagar aftaná. Minst til at biðja um sjúkraváttan, um tú tørvar hana.

Set teg ið samband við Hjartadeildin 14E, um

- maktarloysi ella tú fært hægri fepur enn 38,5°
- bløðing úr stungustaðnum, blóðmeltað merkið ella ein bunga kemur til sjóndar undir stungustaðnum (um tú kennir eina kúlu undir stungustaðnum)
- stungustaðið verður reytt, hitnar, hovnar, ella pína

Telefonnummur:

Hjartagátt 10D Tlf. 543 2050

Hjartadeild 14 G Tlf. 543 5410

Hjartagátt 10D er opin alt samdøgrið frá mánamorgun kl. 08:00 til fríggjakvöld kl.20:00

Í Føroyum ber tað til, at seta seg í samband við kommunulæknan ella við ambulatoriið

Um tú ella ein av tínum avvarðandi hava spurningar, eru tit vælkomin til at ringja.

Við ynskjum um skjótan og góðan bata

Starvsfólkið á Hjartagátt

ÚTGEVARAR:
LANDSPÍTALI
JÚNÍ 2013

ÁBYRGÐARMENN:
YFIRLÆKNIR OG DEILDARSTJÓRI
HJARTADEILDAR 14EG

ÞÝÐING:
MAJBRITT VESTERGAARD

HØNNUN:
KYNNINGARMÁL LSH/ÁC